GJALDSTOVAN

# ÚTBJÓÐINGARSKRIV

## Telefoni og internet

# Innihald

1.0 Útboð av telefoni og internet ..... 3

1.1 Yvirskipað ..... 3

2.0 Treytir ..... 3

2.1 Yvirskipað ..... 3

2.2 Sáttmálakrøv ..... 4

2.3 Longd av sáttmálaskeiði ..... 4

2.4 Sáttmálatreytir ..... 4

3.0 Krøv telefon hald og internet hald ..... 5

3.1 Yvirskipað ..... 5

3.2 Mongd ..... 5

3.3 Krøv til fartelefon hald ..... 6

3.4 Krøv til fastnettelefon hald ..... 6

3.5 Krøv til internet og SamNet hald ..... 7

3.6 Krøv til tólnet hald ..... 7

3.7 Skiftistíðin ..... 7

3.8 Vekslari og Totalview ..... 8

3.9 Dekningur, tøkni og dátutrygd ..... 8

3.10 Ólag á sambandinum ..... 8

3.11 Flyting av telefon (migratión) ..... 8

4.0 Umsiting ..... 9

4.1 Rokningar og upplýsing ..... 9

5.0 Tilgongdin at finna veitarar ..... 9

5.1 Samráðingar og sáttmáli ..... 9

5.2 Fyrivarni og minstakrøv ..... 10

5.3 Viðgerð av innkomnum tilboðum ..... 10

5.4 Meting ..... 10

5.5 Uppgerð av prís ..... 10

5.6 Hvønn rammusáttmála skulu stovnar nýta ..... 11

# 1.0 Útboð av telefoni og internet

## 1.1 Yvirskipað

Gjaldstovan vil við hesari áheitan geva tykkum møguleikan at bjóða uppá at fáa rammusáttmála til landsins keyp av telefoni og internet.

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi innlating av tilboði, samskifti í millum útbjóðara og tilboðsgevara og aðrar upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

Kjarnuuppgávan er at tryggja landsins stovnum gott internet og telefonsamskifti – til ein kappingarføran kostnað.

Keyp landsins vil við hesum geva tykkara fyritøku møguleikan at bjóða upp á veiting av telefoni og internet til landsins stovnar. Niðanfyri vera treytir settar til veiting av telefonsamskifti. Ein av fyritreytunum hjá landsins stovnum, fyri at útinna sínar arbeiðsuppgávur, eru haldgóð telefonhald og internetsamband. Hetta er sjálvandi eisini ein fyritreyt í dagsins samfelag, og í fleiri førum kann tað hava álvarsligar fylgjur um hetta vantar. Okkara stovnar eru á næstan øllum oyggjum í Føroyum og hevur tað alstóran týdning fyri, at starvsfólk kunna røkja sítt arbeiði, at hesi hava nøktandi samskiftissamband.

# 2.0 Treytir

## 2.1 Yvirskipað

Gjaldstovan er greið yvir, at landsins telehald eru ein stórur partur av føroyska telefonmarknaðinum, og tí er neyðugt at vísa eitt sindur av varsemi. Avgjørt er tí, at vit royna at gera rammusáttmála við meira enn ein veitara á tele- og internetmarknaðinum. Hetta skal skiljast soleiðis, at Gjaldstovan kann gera rammusáttmálar við báðar veitarar í Føroyum, og at landsins stovnar skulu sjálvir fyrihalda seg til rammusáttmálarnar og velja sín veitara, undir ávísum treytum. Um tað eydnast at gera rammusáttmála við fleiri veitarar, so verður tað tann einstaki stovnurin, sum tekur støðu til hvønn rammusáttmála hann nýtir (undir ávísum treytum), og harvið so meta vit, at hetta útboð ikki fer at órógva telefonimarknaðin í Føroyum.

Gjaldstovan viðurkennir eisini, at telefoni í síni heild kann verða trupul og avbjóðandi at lýsa til fulnar í útbjóðingartilfari – serliga tá landsins stovnar eru so ymiskir. Vandin við útbjóðingartilfari vil altíð verða, at man ger tað kompleksa einfalt ella tað einfalda kompleks. Tí metir Gjaldstovan, at við at gera rammusáttmála við báðar veitarar, so flyta vit "avgerðin" út á stovnarnar, sum betur kenna sín tørv, og sum soleiðis kunnu taka eina avgerð út frá frammanundan gjørdum rammusáttmálum. Tað í sær sjálvum vil spara televeitarum og stovnum nógva tíð og orku, samanborið við at allir 80 stovnar fóru undir egin útboð.

Fyri at ein televeitari skal gera ein rammusáttmála við Gjaldstovuna, so verður sett sum treyt, at talan er um nøktandi prísir og viðskiftatreytir. Hetta skal skiljast soleiðis, at talan er um prísir og viðskiftatreytir, sum eru tilboðsprísir, eitt nú á hædd við hvat veitarin vanliga bjóðar, tá talan er um útboð. Hetta merkir somuleiðis at

Gjaldstovan kann vraka eitt tilboð frá einum veitara, um Gjaldstovan ikki metir at prísir og/ella viðskiftatreytir eru nøktandi, og harvið einans gera rammusáttmála við annan veitaran.

## 2.2 Sáttmálakrøv

Veitarin skal geva stovnum ein fastan kundaráðgeva, sum skal verða tøkur saman dag tá spurningar ella avbjóðingar koma fyri. Er viðkomandi ikki til staðar, so skal veitarin altíð hava avloysara tøkan.

Kundaráðgevin skal verða tillutaður antin í tilboðnum ella tá ið sáttmálin verður undirskrivaður. Veitarin skal upplýsa teldupost og beinleiðis telefonnummar hjá kundaráðgeva. Veitarin kann upplýsa hvussu stovnar landsins skulu gera, tá kundaráðgevin er burturstaddur.

Tað er eitt krav, at veitarin hevur skipan til sjálvavgreiðslu, har stovnar okkara síggja hvørji hald teir hava. Eisini skulu teir kunnu stovna, broyta og strika hald, áseta eykatænastur og hava eftirlit við nýtslu. Tað verður mett jaligt, um veitarin hevur eina loysn til at skráseta og loysa fráboðanir um manglar, feilir og brek við veitingini.

Brek skulu umvælast innan rímiliga tíð, alt eftir hvussu umfatandi brekið er.

Nógvir av landsins stovnum hava eina skipan við televeitara, sum eitur deild rokning. Hendan tænasta ynskist at kunna tilveljast.

Meginreglan er, at prísvøkstur ikki verður góðtikin í fyrsta ári, men eftirfylgjandi ár, kann prísurin hækkað samsvarandi almenna prístalinum. Veitarin kann hækkað prísin enn meir, tá talan er um force major líknandi støður ella serligar undantakstøður, sum vóru ókendar tá tilboð var latið inn. Um Gjaldstovan ikki góðtekur hesar príshækkingar, so kann Gjaldstovan velja heldur at fara í nýtt útboð.

## 2.3 Longd av sáttmálaskeiði

Keyp landsins ynskir at gera 1 ára sáttmála, við ein ella fleiri televeitarar, um veiting av telefoni og internet. Rammusáttmálarnir kunnu longjast upp í 3 ár um partarnir eru samdir.

Veitarin og Gjaldstovan kunnu uppsiga hendan sáttmála við skrivligari fráboðan við eini freist á fýra mánaðir. Er talan um týðandi mishald, kann sáttmálin sigast upp við skjótari freist, sum stendur mát við mishald.

## 2.4 Sáttmálatreytir

Keyp Landsins ynskir at gera ein sáttmála við ein ella fleiri televeitara um veiting av telefoni og internet. Tað er eitt krav fyri at fáa rammusáttmála við Gjaldstovuna, at man góðtekur, at ein stovnur kann velja at brúka báðar sáttmálar, tvs vera kundi hjá báðum veitarum.

Við sáttmálanum bindur Gjaldstovan landsins stovnar, sum eru knýttir at rammusáttmálanum, at fylgja ásetingum í rammusáttmálanum. Tað kunnu vera stovnar, sum longu hava bundið seg til annan veitara, og hesir koma við í avtaluna so skjótt teirra avtala gongur út.

Meginreglan er, at allir stovnar landsins eru umfataðir av útboðnum. Tað kunnu koma støður, har tað ikki er

møguligt hjá einum stovni at verða partur av hesum útboði. Hetta eru støður, sum serliga kunnu íkoma, um Gjaldstovan einans velur at gera rammusáttmála við ein veitara. Dømi um tað kann verða:

- Starvsfólk, sum arbeiða í ávísum landi, har nýggi veitarin ikki hevur nøktandi avtalu
- Neyðugt er við ávísum hentleikum í Totalview
- Tól sum standa í trupult atkomuligum stað
- Tøknuligar avbjóðingar til ávísar tænastur
- Skipanir, sum eru bundnar til ávísan veitara, tí tær eru forritaðar til ávísan veitara.

Stovnar skulu søkja um at fáa undantak frá Gjaldstovuni, um teir ikki kunnu nýta rammusáttmálan. Meginreglan er tá, at stovnurin, sum fær undantak, skipar sítt egna útboð. Í slíkum førum er tað krav, at viðkomandi stovnur hevur verði í samskifti við vinnandi veitaran av rammusáttmálanum, fyri at vissa sær, at tað ikki er gjørligt at verða partur av rammusáttmálanum. Meginreglan er, at undantak skal avmarkast til einans tað veiting, sum nýggi veitarin ikki megnar.

Veitarin kann ikki áleggja nýggj ómaksgjøld, rykkjaragjøld ella onnur gjøld, sum ikki eru við í tilboðnum frá veitaranum. Allir prísir skulu verða við MVG.

Rammusáttmálin umfatar ikki keyp av fartelefonum.

Fyrivarni verður tikið fyri villum í útboðnum og neyðugum broytingum, og tí tilskilar Keyp landsins sær rættin at senda út møguligt rættingarskriv.

Hesin háttur at bjóða út er fyri okkum ikki væl royndur, tí tilskila vit okkum rætt til at strika hetta útboð – um orsøkir tala fyri tí.

# 3.0 Krøv telefon hald og internet hald

## 3.1 Yvirskipað

Vitandi at tørvur og loysnir á teleøkinum eru ymiskar, so kann verða trupult at gera ein einfaldan príslista. Hinvegin er neyðugt, at veitarin nøkulunda samansetur síni vørur/tænastur á sama hátt, fyri at vit kunnu samanbera tilboð, tí fara vit í omanfyristandandi at lýsa hvussu prísir og treytir skulu upplýsast í tilboði.

Hetta útboð er tó ein øðrvísi háttur at bjóða út, tí vit eru sinnað at lata fleiri veitarar fáa ein rammusáttmála við landsins stovnar, og vit grundgeva hetta við, at vørur/tænastur kunnu vera ymiskar. Tí er tað eisini natúrligt, at tilboð ikki eru púra eins, tá tey verða latin inn. Vit ynskja tó, at veitarar uppgerða sínar prísir eftir meginreglum í hesum útboði, har tað beinleiðis er nevnt.

## 3.2 Mongd

Talan er um áleið 2.700 fartelefonhald, 600 fastnettelefonhald, 1.050 tólhald og 200 internetlinjur. Hetta er út frá søguligum tølum frá 2023. Talið kann verða voksið ella minkað síðani.

## 3.3 Krøv til fartelefon hald

Fartelefonhald, sum veitarin bjóðar, skulu sum meginregla verða á støði við vanlig vinnuhald, sum veitarin bjóðar, eitt nú 5G tøkni. Vit síggja fyri okkum, at haldini skulu í minsta lagi hava fylgjandi:

- Frí tala, í Føroyum, uttanlands og til útheimin, við "fair usage" mark
- Frí SMS, í Føroyum, uttanlands og til útheimin, við "fair usage" mark
- 15GB data í Føroyum og uttanlands (lond, ið vinnuhald vanliga kunnu nýta)

Tað skal verða møguligt hjá stovninum at velja fylgjandi eyka pakkar:

- Data pakkin, hevur óavmarkað data í Føroyum og 50GB uttanlands.
- Vekslara funktiónspakkin
- Einfaldi telefon pakkin. Er ætlað til fartelefonir, sum hava avmarkaða nýtslu, sum eitt nú eru komnar fyri fastnet telefonir. Frí tala og sms, 1GB í FO, kann ringja til telefonnummar í útheiminum, men ikki brúkast uttanlands. Hetta er sostatt ein niðurtrappan.
- Virtuelt nummar pakkin, við frí'ari umstilling
- Deildrokning

Veitarar kunnu bjóða aðrar pakkar, men grundleggjandi ynskja vit ikki ov nógvar møguleikar, tí hetta tyngir umsitingina.

Við frí tala, so eru vit greið yvir, at tá ið ringt verður til telefonnummur, sum hava gjøld fyri eina tænastu, so sum nummarkall, so er hetta ikki partur av fríari talu. Líknandi um ringt verður til innsavning til vælgerandi endamál.

Tá vit skriva "uttanlands", so skal hetta skiljast sum tey lond, sum veitarin bjóðar í sínum haldum til vanligar kundar.

Telefonnummur og nummarblokkar skulu varðveitast.

## 3.4 Krøv til fastnettelefon hald

Haldini, sum veitarin bjóðar, skulu sum meginregla verða á støði við vanlig vinnuhald, sum veitarin bjóðar sínum vinnukundum. Vit síggja fyri okkum, at haldini skulu í minsta lagi hava fylgjandi:

- Frí tala, í Føroyum og til uttanlands

Veitarar kunnu bjóða aðrar pakkar, men grundleggjandi ynskja vit ikki ov nógvar møguleikar, tí hetta tyngir umsitingina.

Við frí tala, so eru vit greið yvir, at tá ið ringt verður til telefonnummur, sum hava gjøld fyri eina tænastu, so sum nummarkall, so er hetta ikki partur av fríari talu. Líknandi um ringt verður til innsavning til vælgerandi endamál.

Um veitarin tekur gjøld fyri nýtslu, so skal hetta upplýsast í tilboðnum, og kann hetta verða tikið við í prísvektingini.

Telefonnummur skulu varðveitast.

## 3.5 Krøv til internet og SamNet hald

Haldini, sum veitarin bjóðar, skulu sum meginregla verða á støði við vanlig vinnu ella privat hald, sum veitarin bjóðar sínum vinnukundum. Vit hava um 300 internetlinjur, har størri parturin er breiðband og minni parturin er SamNet.

Vit ynskja prís á bæði privatbreiðband, vinnubreiðband og SamNet, í øllum vanligum ferðum og treytum, sum tit vanliga bjóða tykkara viðskiftafólkum.

Vit skulu gera vart við, at nøkur hald hava tørv á, at IP addressan er støðug, og tí kunnu stovnar illa skifta hesi hald til annan veitara.

Veitarin kann eisini bjóða 5G internethald.

## 3.6 Krøv til tólnet hald

Haldini, sum veitarin bjóðar, skulu sum meginregla verða á støði við vanlig vinnuhald, sum veitarin bjóðar sínum vinnukundum. Vit síggja fyri okkum, at haldini skulu í minsta lagi hava fylgjandi:

- 1 GB frítt data
- 100 GB frítt data
- Væl størri ella óavmarkað data við fair usage

Vit hugsa, at veitarin bjóðar 5G sum meginregla.

Veitarar kunnu eisini bjóða:

- CAT-M1 við eDRX virki
- NB-IoT við Power Saving Mode (PSM) virkið
- 2G
- 3G
- 4G
- Mobil Private Network í stíl við Míttnet hjá Føroya Tele

Um veitarin tekur gjøld fyri nýtslu, so skal hetta upplýsast í tilboð, og hetta kann verða tikið við í prísvektingini.

## 3.7 Skiftistíðin

Um skift verður til nýggjan veitara, so skal nýggi veitarin standa fyri at skifta SIM kort og líknandi.

Nýggi veitarin skal kunna vísa á eina tíðarætlan fyri øll skiftini av øllum haldum og hvørja avleiðing hetta kemur at hava í skiftistíðini.

## 3.8 Vekslari og Totalview

Nakrir stovnar nýta tíðarskásetingarskipanina Totalview, sum vekslara funktión. Veitarin skal virka við Totalview, soleiðis at Totalview kann verða ein vekslaraskipan, ið sum minsta krav umstillar inngangandi kall.

Til teir stovnar, sum ikki hava nakra vekslara skipan, skal veitarin kunna bjóða eina vekslara funktión. Henda skipanin skal í minsta lagið megna at umstilla inngangandi kall, víðaristilla kall og gera ringibólkar. Vit gera vart við, at vekslara funktónin er ein skipan, sum stovnar skulu kunna velja til sum eina eyka tænastu.

Vit eru greið yvir, at tørvur og uppsettan av vekslara funktión hjá stovnum er ymisk, á sama hátt sum okkara stovnar eru ymiskir. Vit ynskja at henda uppseting er ókeypis – tvs er løgd omaná ymisku haldini.

## 3.9 Dekningur, tøkni og dátutrygd

Sum vit skilja tað, so hava veitarar sama farnet kring landi (mastrar). Hetta skilja vit sum, at veitarar tí hava sama dekning.

Tøknin skal sum meginregla verða 5G.

Tað er tilvitað, at hetta útboð ikki ásetur tøknilig innanhýsis krøv hjá veitaranum, um hvussu hann skipar sítt innanhýsis "maskinrúm". Harafturímóti verður kravt, at veitarin veitir telefoni í høgari góðsku, so sum at brek verða rættað skjótt, og at stovnarnir eru nøgdir við góðsku og tænastu. Ger veitarin ikki tað, er hetta at meta sum mishald, og sum verður handfarið eftir meginreglinum úr avtalulógini.

Tað er eitt krav, at veitarin leggur orku í at hava eitt trygt net, sum verjir samskifti hjá stovnum landsins, og tað er eitt krav, at veitarin lýkur øll trygdarkrøv sett av myndugleikunum.

## 3.10 Ólag á sambandinum

Veitarin skal kunna vísa á, hvussu hann handfar støður tá sambandið rýkur ella ikki koyrir sum tað skal. Vit loyva veitaranum at hava eina loysn (SLA) til einstakar stovnar. Serliga hevur tað týdning, tá bygningar og størri bólkar hava ólag á sambandinum, at veitarin tá arbeiðir uttan íhald fyri at fáa sambandið aftur at koyra, og/ella veitir backuploysnir, tá talan er um størri og longri varandi brek.

## 3.11 Flyting av telefon (migratión)

Í samband við útboð er altíð møguleiki fyri, at flyting fer fram frá einum veitara til ein annan.

Um gjald verður tikið fyri flytingina, so skal hesin verða upplýstur, og innganga í prísvektingini.

Báðir partar eiga at kýta seg eftir, at flyting fer fram skjótt og ómakaleyst, eftir at sáttmáli er undirskrivaður. Veitarin skal gera eina útgreinaða tíðarætlan fyri hvussu flyting skal fara fram og við minstu ávirkan á raksturin hjá stovninum. Tíðarætlanin skal innihalda

- Skifta SIMkort og eSIM
- Leggja veklsarar um
- Samantvinna telefon og vekslara, herundir Totalview
- Undirvísa stovnum
- Annað

# 4.0 Umsiting

## 4.1 Rokningar og upplýsing

Stovnarnir og veitarin samskifta beinleiðis. Stovnar rinda sjálvir fyri síni keyp. Keyp Landsins á Gjaldstovuni hjálpir fegin um ivamál eru. Fyri stovnar, sum eru á Landsnet, og hava tørv á internet linju, er tað KT-landsins, sum er "kundin".

Upplýsingar um rammusáttmálan við prís og treytum verður lagdir út á keypsportal.fo – har bert stovnar landsins hava atgongd. Prísurin verður sostatt sum meginregla ikki almannakunngjørdur.

Rokningin skal verða talgild, í vanligum oio-sml format. Veitarin, sum vinnur útboðið, bindur seg til at lata Keyp landsins upplýsingar um sølu hjá stovnum landsins, tá Keyp landsins umbiður hesar.

Gjaldstovan hevur tørv á at fáa upplýst hvussu stór árlig sparing er í mun til vanligan listaprís. Hendan upplýsing er ikki neyðug í sjálvum tilboðnum, men kann koma aftaná.

# 5.0 Tilgongdin at finna veitarar

## 5.1 Samráðingar og sáttmáli

Útbjóðarin hevur heitt á teir stovnar sum hava nógv hald, um at luttaka í einari dómsnevnd, ið er við til at taka avgerðina. Í dómsnevndini sita KT Landsins, Landsverk, Apoteksverkið og Almannaverkið – umframt Keyp landsins.

Vit ætla ikki, at tað skal verða nakað samráðingarumfar. Útbjóðari kann tó venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tað vera sostatt ongar sáttmála- ella príssamráðingar í samband við hetta útboðið, og tískil verður heitt á tilboðsgevara um at fyrireika tilboðið soleiðis, at sáttmálin kann undirskrivast á tilboðsskjalinum, har allar treytir í útbjóðingartilfarinum eru við.

Øll krøv í útboðstilfarinum eru minstukrøv. Eitt minstakrav verður skilt sum eitt krav, ið treytaleyst skal lúkast.

## 5.2 Fyrivarni og minstakrøv

Tilboð, ið ikki lúka øll minstukrøv verða burturvíst, men tað verður tó sipað til, at útbjóðari kann venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun millum tilboðsgevarar.

Tilboðsgevari verður eggjaður til at seta skrivligar spurningar, um ivamál eru í samband við útfylling av fylgiskjølunum.

Tilboðsgevarar kunnu ikki hava skuld til tað almenna, vísandi til galdandi reglur.

Tilboð skal standa við 60 arbeiðsdagar roknað frá ásettu tilboðsfreist.

## 5.3 Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreyt.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing av avgerðini, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## 5.4 Meting

Gjaldstovan kann gera av at taka av fleiri tilboðum um rammusáttmála. Fyri at taka av einum rammusáttmála, skal Gjaldstovan meta at talan er um ein nøktandi samsvar millum tann prísin, sum verður latin, og ta tænastu, sum verður veitt. Gjaldstovan kann velja ikki at taka av einum tilboð um rammusáttmála, og harvið einans gera avtalu við ein veitaran.

## 5.5 Uppgerð av prís

Veitarar skulu lata inn prísblað, sum upplýsir prísirnar soleiðis sum upplýst í hesum útboði.

Um veitarin fær tillutað ein rammusáttmála, so fær veitarin møguleika at gera eitt snøggari prísblað, sum stovnarnir fáa til støðutakan.

## 5.6 Hvønn rammusáttmála skulu stovnar nýta

Meginreglan er, at ein stovnur skal velja tann veitara, sum er bíligast fyri stovnin – har man heldur prís, góðsku og tænastu saman.

Ein stovnur kann velja ein dýrari veitara, um meir-tænastur, sum dýrari veitarin veitir, hava týdning og eru neyðugar fyri stovnin, saman hildin við meirkostnaðin. Um ein stovnur umhugsar, at velja tann dýrara veitaran, so skal stovnurin verða vísur í, at avgerðin er tikin við røttum upplýsingum. Tað vil siga, at stovnurin skal samskifta við bíligasta veitaran, fyri at tryggja sær at upplýsingar og teknisku loysnirnar eru rætt skiltar. Um ein stovnur velur dýrara veitaran, so skal stovnurin gera eina uppgerð/notat, sum vísir hví dýrara loysnin verður vald. Hetta notat skal verða tøkt til møguligt eftirlit frá Landsgrannskoðaranum og skal sendast til Keyp landsins.

Ein stovnur kann ikki velja dýrara veitaran – bert við at vísa til, at "prísmunurin er lítil" ella tí "ein skiftiskostnaður er". Talan skal veruliga vera um nærum ongan prísmun. Tað er týðandi, at stovnar vísa varsemi við slíkum grundgevingum, tí tær máa grundarlagi undan yvirhøvur at fara í útboð.

Ein stórur stovnur kann gott deila sítt virksemi til báðar veitarar, um orsøkir tala fyri tí.

Keyp landsins fer aktivt at samskifta við stovnarnar í tíðini til avgerð verður tikin.

Taka vit saman um, so er umráðandi at staðfesta, at "prísur vigar ikki 100%". Tað kunnu vera stovnar har tørvurin er einfaldur. Tá telur prísurin einsamallur. Men tað kunnu vera stovnar, har ein tænasta ella veiting hevur týdning og eru neyðug fyri stovnarnar, saman hildin við meirkostnaðin. Tá verður annað enn prísur vektað.

Somuleiðis er umráðandi at staðfesta, at vit ikki neyvt uppgerða hvussu nógv annað enn prísur kemur at vekta, tá stovnar taka avgerð. Stovnar skulu meta um meir-tænastan, sum dýrari veitarin veitir, hevur týdning og er neyðug fyri stovnin, saman hildin við meirkostnaðin. Stovnar skulu sostatt gera eina kostnaðaruppgerð, og teir skulu grundgeva fyri hví teir velja dýrara veitaran í einum notati. Keyp landsins kemur at fylgja hesum arbeiði aktivt.

Hugsa dømi um uppgerð/notat sum ein stovnur skal gera.

> *Dømi 1*
> *Vit á x-stovnur hava eftirkannað báðar rammusáttmálar, og eru komin til niðurstøðuna, at báðir veitarar uppfylla tey teknisku krøv, sum okkum tørva, og at báðir veitarar uppfylla tey tænastu krøv, sum okkum tørva. Vit eru tí komin til ta niðurstøðu, at prísurin verður avgerandi. Vit hava 13 telefon hald, 1 fastnetlinju og 1 internetlinju. Veitari A kostar kr. 15.000 og veitari B kostar 16.000 um ári. Vit hava tí valt veitara A.*
>
> *Dømi 2*
> *Z-Stovan hevur gjørt eina meting av rammusáttmálanum. Vit síggja, at veitari B kann bjóða okkum eina Q-tænastu, sum veitari A ikki klárar at veita. Henda Q -tænasta hevur týdning tá okkara starvsfólk skulu loysa*

*“ítøkiliga uppgávu”. Tá vit uppgerða prísin. so kostar veitari A kr. 15.000 og veitari B kostar 16.000 kr. Vit meta at Q-tænastan, sum veitari B kann bjóða, hevur størri týdning enn sparingin við at velja veitara A.*

*Dømi 3*
*Stovnur ZX hevur gjørt sínar samanberingar av rammusáttmálanum, og teimum treytum og tænastum, sum bjóðaðar vera. Vit eru komin eftir, at ikki er gjørligt at skifta okkara internet linju til bíligasta veitara, orsaka av tí teknisku orsøk, at stovnurin má hava ein ávísa fasta IP adressu fyri at “okkurt ítøkiligt” skal rigga. Somuleiðis hava vit simkort í nógvum mastrum kring landi og boyum á havinum, sum eru nærum ov trupul at náa. Vit hava tí avgjørt at internetlinja og tólhald fara til tann dýrara veitaran, meðan restin fer til hin bíligara veitaran.*

| Virksemi | Dato, klokkutíð |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 4.1. | Mánadagin 17. august kl 12.00 |
| Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.1. | Týsdagin 25. august kl 12.00 |
| Væntandi tillutan av sáttmála | 25. september |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Hallur Thomsen

Deildarleiðari